Martin Heinesen, leiðari á oljufyrisitingini:

Vit halda tíðarætlan - útbjóðing í 96-97

Onkur heldur tað gongur ov seint, onkur ov skjótt. Men á oljufyristingini royna tey at halda tíðarætlanina, sum er ásett av ráðleggingarnevnd og politikarunum. Miðjað verður móti at bjóða út øki til boring í endanum av 96 ella byrjan av 97.

Western hevur nú gjørt lítlan faldara, har felagið lýsir seismikkin við Føroyar til sølu

Gongd er nú aftur komin á seismisku kanningarnar undir Føroyum. Western skipið "Western Hercules" kom á Havnina í farnu viku og hevur nú verið úti í góða viku. Hetta er triðja skipið hjá Western, sum ger seismiskar upptøkur við Føroyar. Hini bæði vóru Sea Star og Polar Princess. Tey gjørdu upptøkurnar í fjør.

Martin Heinesen, leiðari av oljufyrisitingini heldur, at tað hevur gingið væl við kanningunum, hóast onkrar seinkingar hava verið í sambandi við sjálva viðgerðina av upptøkunum á høvuðsstøðini hjá Western í London.

Hetta kemst m.a. av, at talan er um eitt heilt nýtt øki við tjúkkum basaltfláum.

Vit spurdu Martin Heinesen, um henda seinking eisini kann hava nakað at gera við, at teir hava valt tað skeiva felagið at gera arbeiði - um ikki Geco, sum eisini royndi at fáa sáttmálan, hevði megnað hetta betur?

Til tað sigur hann, at Western er høgt í metum sum seismikkfelag, og tað hevði eisini besta tilboðið.

Men tað er sjálvandi einki til hindurs fyri, at onnur seismikkfeløg kunnu fara undir meira nágreiniligar uppgávur í framtíðini leggur hann aftrat.

Martin Heinesen, leiðari av oljufyrisitingini her saman við tveimum av lykilpersónunum, nú grundarlagið verður lagt undir eina møguliga komandi oljuvinnu. Allan Skaalum, sum tekur sær av búskaparligum spurningum og Herólvur Joensen, sum hevur løgfrøðina um hendi. Mynd kalmar

Avtalan við Western gongur út í ár. Sambært hesi avtalu skal Western skjóta seismikk í øllum tí føroyska økinum, eisini í teimum pørtunum av landgrunninum vestan fyri, har vónirnar at finna olju eru sera smáar, eitt nú orsakað av teimum kilometra tjúkku basaltløgunum.

Western skuldi skjóta umleið 12.000 kilometrar í alt og restar teimum einar 6000 kilometrar, sum verða skotnir í summar og í heyst.

Stórur áhugi fyri at keypa seismikk

Fleiri oljufeløg hava víst áhuga fyri at keypa tilfarið frá Western. Millum tey størstu er ein bólkur, ið kallar seg "The Atlantic Margin Group", sum fevnir um norska Statoil, amerikanska Mobil Oil og enska Enterprice Oil.

Jarðfrøðingar hjá hesum trimum feløgunum sita í hesi løtu og tulka linjurnar, sum tey hava fingið frá Western.

Ein annar samstarvsbólkur, ið fevnir um danska DONG, norska Saga, bretska Lasmo og amerikanska Amerada Hess, skal í hesum døgum taka støðu til, hvussu nógv tilfar hann skal keypa. Tú kanst keypa eitt sindur ella allan pakkan sum hann er. Fyri at fáa tilfarið um Loprabolið mást tú keypa meira enn 25% av øllum pakkanum. Western Geofysical roynir í hesum døgum at lýsa seismikkin til sølu í altjóða oljubløðum. Í hesum sambandi hevur fyritøkan gjørt ein faldara við upplýsingum um innihaldið í hesum fyrsta føroyska seismikkpakkanum.

Sosialurin hevur roynt at fingið upplýst, hvørji onnur oljufeløg eru áhugað í seismiska tilfarinum frá Western, men slíkt verður oftani hildið loyniligt eina tíð. Men vit frætta, at áhugin er stórur millum tey flestu av teimum stóru oljufeløgunum.

Oljufyrisitingin fingið stóra arbeiðsstøð

Eisini okkara egnu fólk tulka seismikkin. Fyri at kunna gera hetta so væl til ber, hevur oljufyrisitingin júst fingið sett upp eina stóra og spildurnýggja arbeiðsstøð. Ein slík arbeiðsstøð eru framkomnar teldur, skermar og onnur útgerð.

Í løtuni situr Heri Ziska, ið er settur sum jarðfrøðingar við seismikki sum sergrein og tulkar seismisku upptøkurnar við Føroyar.

Hetta er eitt sera umfevnandi arbeiði og verður tað bæði gjørt við hond og á teldu. Tá linjurnar eru fleiri kilometrar langar, ber ikki til bara at arbeiða á telduskerminum, men her ber tó til at fara meira niður í smálutir við ávísum pørtum av undirgrundini.

Partur av avtaluni við Western er, at fyritøkan skal útvega føroyingum eina slíka arbeiðsstøð, meðan tulkingin fer fram, soleiðis at eisini vit eru við til at viðgera seismikkin. Í avtaluni stendur eisini, at allar upptøkurnar skulu latast føroysku oljufyrisitingini.

Halda tíðarætlan

Vit spurdu Martin Heinesen, um teir klára at halda tíðarætlanina og hvat hann hevur at siga til tey fólk, sum halda, at tað gongur ov seint við arbeiðinum hjá oljufyrisiting og ráðleggingarnevnd?

-Vit hava varhugan av, at tey flestu feløgini halda, at gongdin og tímingin eru góð. Okkurt felagið hevur so hildið, at tað átti at gingið skjótari, men okkurt annað hevur víst á, at tíðin at fyrireika seg í er ov lítil. So tað vilja altíð vera eitt sindur ymsar meiningar, men samanumtikið haldi eg, at tað gongur sum tað skal.

Uppá fyrispurning um tað vildi verið rætt at fingið sær útlendskar serfrøðingar at hjálpt sær, soleiðis at tað gekk skjótari sigur Martin Heinesen, at hetta altíð vil vera eitt val.

Tað krevur eitt sindur av tíð at byggja at viðurskiftunum og tryggja sær, at tað verður gjørt uppá tann rætta mátan. Ein kundi sjálvandi gjørt tað skjótari, men tá tað eru føroyingar, sum skulu taka avgerðirnar, so krevur tað eisini, at tað eru føroyingar í skipanini, sum føla, at tað er í lagi. At kunna fáa henda varhuga, at alt er í lagi, krevur so bæði tíð og royndir. Og hetta eru royndir, sum okkara egnu fólk eisini mugu sleppa at gera.

Men onkur vísir á, at støðan í samfelagnum er so mikið álvarslig, at ein eigur at skunda undir útviklingin?

-Tað er so ein politiskur spurningur, hvussu skjótt hetta skal ganga og hvussu nógv orka verður løgd í tað. Tað er so ikki okkara uppgáva at skunda undir útviklingin út frá tí støðu, sum í samfelagið er í júst nú.

Martin Heinesen vísir á tíðarætlanina í álitinum hjá oljuráðleggingarnevndini, sum landsstýri og løgting

➔



Heri Ziska er væl nøgdur, nú hann hevur fingið eina framkomna arbeiðsstøð at brúka í tulkingini av seismikkinum. Mynd kalmar

Western Hercules fyri fyrstu ferð á Havnini. Tað ger nú seismiskar upptøkur á Føroyaleiðini. Mynd kalmar

eisini hava valt at fylgja. Hann sigur, at bæði fyrisitingin og ráðleggingarnevnd ætla sær at gera alt fyri at halda hesa tíðarætlan.

Vit spurdu Martin Heinesen, um tað fer at eydnast at hava eitt útbjóðingarumfar klárt til á vetri í 1996.

Drúgv frágreiðing latast myndugleikunum

Vit satsa upp á at hava eitt útbjóðingarumfar klárt seint í 96 ella tíðliga í 97. Talan verður um eina rættiliga drúgva frágreiðing frá oljufyrisitingini og oljuráðleggingarnevnd, sum miðjað verður móti at hava klára til landsstýrið tíðliga á sumri í 1996. So krevur landsstýrið nakað av tíð til at viðgera frágreiðingina og skal so til at leggja fyri tingið uppskot um lógir o.l.

-Vit vóna, at út á heystið í 96 eru øll tey viðurskiftini komin upp á pláss og so er klárt hjá okkum at arbeiða ítøkiliga við lisensumfarinum. Men vit mugu hava karmarnar frá okkara lóggevandi valdi klárar áðrenn.

Á skeið um oljubúskap í Dundee

Bæði oljufyristing og oljuráðleggingarnevnd hava annars nógv um at vera í hesi tíð.

Roynt verður at savna alt tað tilfar, sum kann gagna arbeiðinum og í hesum sambandi hava tey samskift útlendskar serfrøðingar. Harafturat hava tey javnan fundir við fólk frá oljuvinnuni í øðrum londum.

Í hesum sambandi er vert at nevna, at í farnu viku fóru Árni Olafson, Claus Rasmussen og Allan Skaalum til Dundee á eitt sera umfatandi skeið í oljubúskapi. Teir báðir fyrstnevndu umboða oljuráðleggingarnevnd. Allan Skaalum er fyri stuttum settur at taka sær av búskaparligum spurningum hjá oljufyrisitingini og ráðleggingarnevnd.

Teir eru á lærda háskúlanum í Dundee á Center for Petroleum and Mineral Law and Policy.

Við á skeiðnum eru fleiri av teimum kendastu og bestu serfrøðingunum innan oljubúskap.

-Vit sita ti ikki bert í okkara lítla búri og halda okkum vera alvitandi, um onkur heldur tað um okkum, sigur Martin Heinesen og heldur fram:

-Vit royna alla tíðina at gera eitt sera umfatandi uppsøkjandi arbeiði og royna at súgva til okkum alla hugsandi upplýsing.

Treytir og útbjóðing

Men hvat heldur Martin Heinesen um hetta ikki at seta ov harðar treytir til oljufeløgini, soleiðis at vit styggja tey burt, men harafturímóti at gera lisensirnar so innbjóðandi sum gjørligt?

-Hatta er ein sera sentralur spurningur, hetta at royna at finna eina javnvág í sambandi ásetan av reglum og treytum fyri lisensirnar.

Ein má ikki seta treytirnar so harðar, at ein styggir oljufeløgini burtur. Tey skulu síggja ein møguleika í at koma her. Samtíðis skulu vit royna at fáa sum mest burtur úr til okkara samfelag.

Martin Heinesen sigur, at hetta ikki er nakar lættur spurningur, tí tað vilja vera so nógvar meiningar um, hvat og hvar tann besta javnvágin er.

Men hevur tú sjálvur nakra meining um, hvar hon liggur?

-Nei tað havi eg ikki, tí tað er eitt sera komplext roknistykki at finna fram til tað. Tað er annars júst hetta vit m.a. sita og arbeiða við.

Kann ikki samanberast

Men skilur tú oljufeløgini, tá tey siga, at tað er sera torført at arbeiða í hesum økinum og at tað tí ikki ber til at seta teimum eins harðar treytir her sum tær, ið hava verið settar í Norðsjónum t.d.?

Tað skilji eg væl. Føroyaøkið er eitt útjaðaraøki. Vit liggja langt frá tí sentrala oljuprovinsinum, sum er Norðsjógvurin. Nú hjálpir tað eitt sindur, at tað kemur gongd í vestan fyri Hetland.

Eitt annað er, at til veður, tvs. bæði hvat viðvíkur dýpi, streymi og aldu er hetta eitt trupulari øki. Jarðfrøðinga sæð við basaltinum er tað eisini eitt torført, og harafturat kemur, at tað er spildurnýtt og heldur ókent. So vit hava eina rúgvu av faktorum, sum avgjørt ikki eru teir bestu.

Men hinvegin trúgva vit upp á, at áhugin er so mikið stórur millum oljufeløg, at tað skuldi borið til at fingið oljufeløgini hendan vegin við tí røttu javnvágini, og tað má so vera við útgangsstøði í okkara egna. Tað gongur ikki bara at kopiera eitt ella annað, sum er galdandi í Noregi, Onglandi ella aðrastaðni.

Umframt stóru og avbjóðandi uppgávurnar á oljufyrisitingini, so eru tey eisini so smátt við at gera klárt til at flyta oman í bygningin, har landsbókasavnið og fornminnissavnið fyrr hildu til.

jan

Eisini útlendskir serfrøðingar við drúgvum royndum á oljuøkinum eru við í arbeiðinum at menna eina føroyska oljuvinnu, eitt nú Steffan Hultberg, sum í dag er deildarleiðari á DGU og sum annars hevur arbeitt hjá BP í mong ár. Mynd jan

Elding Elding

Ljóð og myndir við eyka dimensjón

Elding hevur fingið einaumboð fyri Philips í Føroyum. Ove Pittersen, stjóri hjá Philips, og Mads A. Winther, stjóri hjá Elding

Nýggja 29" sjónvarpið frá Philips við leysum »Surround« hátalarum geva biografljóð í stovuni.

Tann skarpasta sjónvarpsmyndin uttan nakrar ristingar og tað besta ljóðið eru nú sett saman í hesum sjónvarpinum. Philips sendir í hesum mánaðinum sítt nýggja Match Line 29" sjónvarp á marknaðin, og er tað sett saman við ljóðskipanini »Dolby Pro Logic«. Betur kann tað ikki gerast í dag, og úrslitið kann frá hesi vikuni síggjast og hoyrast hjá Elding í SMS.

Sjónvarpsmyndin er heilt uttan ristingar av tí at í sjónvarpið er bygt inn 100 Hz teknologi. Við sokallaðum Digital Scan Myndafrekvensurin, sum vanliga er 50 Hz, er við hesum sjónvarpinum dupult so høgur. Hetta merkir at sjónvarpsmyndin, sum vanliga ristir eitt sindur, er púra rólig. Og brúkið av tí slætta Black Line-S myndarørinum gevur góða dýpd í myndina og eitt breiðari sjónarøki við minni avskeplingum av myndini.

Reddirnar koma júst har tú væntar tær

Við Dolby Logic Skipanini verður ein bókstaviliga umringaður av flytandi ljóði. Stereoljóðið kemur frammani frá gjøgnum vinstru og høgru kanal í teimum innbygdu síðuhátalarunum, og talan í filminum verður endurgivin av einum hátalara, sum er settur mitt í so tætt við skíggjan sum gjørligt, soleiðis at reddirnar standa í ljóðmyndini, júst har ein væntar tær. Surround effektin, sum gevur eina kenslu av at verða umringaður av ljóði, kemur frá tveimum kompaktum hátalarum, sum verða settir aftan fyri lurtiplássini í stovuni.

Fyri at veita Philips-brúkarum eina góða tænastu, hevur Elding fingið samstarv í lag við Radioverkstaðin v/ Guttorm Mortensen, sum er høvuðsverkstaðurin fyri Philips sjónvørp og radio. Guttorm hevur 15 ára royndir í hesari tænastu.

Tað nýggja Matc-Line sjónvarpið frá Philips kostar uml. 18.900 krónur við teimum tveimum Surround -hátalarunum.

KALT BORÐ
HVØRT KVØLD
uttan sunnukvøld
Borð kann bíleggjast
HOTEL HAFNIA
Tlf. 11270
Hotellið í Miðbýnum

tielbürger
tielbürger
SLÁIMASKINUR
Eykalutir
& umvælingar
p/f PW-ÍSINKRAM
660 Søldarfjørður
Tlf. 41166 - 84166